# Føroyar og neyðuga orkukollveltingin

BJØRT SAMUELSEN
løgtingskvinna



Um 30 ár eru Føroyar leysar av oljuni. Tað má vera okkara mál, og fyri at røkka tí, krevst einki minni enn ein orkukollvelting. Vit mugu hugsa nýtt og hugsa djarvt, og taka stig, sum veruliga muna.

Veðurlags- og orkupolitikkur eru tvær síður av somu søk, og kortini hvørt sítt. Ímeðan tað fyrra snýr seg um at gera okkara part at fyribyrgja ógvusligu árinunum av veðurlagsgassum, so snýr tað seinna seg um at gerast leys av oljuni fyri at framtíðartryggja okkara búskap.

Yvirskipaða málið má vera, at vit sjálvi skulu framleiða nóg mikið av orku til at reka alt samfelagið, umframt at hava rúm fyri framhaldandi búskaparvøkstri.

Utopi? Tann, sum soleiðis talar, er í øllum føri í vanda fyri at verða skýrd naivistur og mistonkt fyri ikki heilt at hava fatað, hvussu stórar avbjóðingarnar eru. Men eingin ivi skal vera um, at avbjóðingarnar eru risastórar. Og tær verða ikki loystar við teirri tøkni, okkara streymveiting í dag byggir á.

**Momentum fyri kollveltingini**

At hugsa um at temja fleiri varandi orkukeldur eru ikki nýggir tankar. Og av røttum kann spurningurin setast: Um tað lønar seg, hví hevur man so ikki langt síðani gjørt tað? Bílig olja hevur higartil gjørt kost/nyttu útrokningarnar neiligar fyri nýggjum varandi orkukeldum. Men tað, at heimurin er um at kódna undir tungari $CO_2$-dýnu samstundis sum alt bendir á, at oljuprísurin fer at hækka munandi, og kanska fleirfaldast í framtíðini, broytir roknistykkið fullkomiliga. Vit fingu ein ósøtan brellbrita uppá, hvussu oljuprísurin kann taka hvørkratak á okkara høvuðsvinnu, tá oljuprísurin í fjør lá um 150 dollarar fyri tunnuna. Løtan er komin, at seta øll segl til at fulltroyta varandi orkuna, vit eru umgird av.

**Loysnir tøkar**

Á ráðstevnuni "Nordic climate solutions", sum varð hildin í Keypmannahavn í september, var høvuðsboðskapurin, at tøkniligu loysnirnar fyri at gerast leys av oljuni, langt síðani eru tøkar. Tað sum væntar, eru ítøkilig politisk stig - krøv frá myndugleikunum og lógarkarmar, sum gera, at ferð kemur á nýtsluna av orkusparandi tøkni og nýggjum orkuloysnum.

Kring heimin streyma milliardir til víðarmenning av grønari tøkni. Samstundis síggja íleggjarar góðar møguleikar at forvinna pengar. Loysnir, vit í dag hava ilt við at ímynda okkum, kunnu saktans vera partur av okkara orkuveiting um fá ár.

**Orkuveiting hugsast av nýggjum**

Okkara streymveiting kemur í dag - umframt frá oljuni - frá vatni og vindi, og her eru bæði ætlanir og møguleikar fyri munandi útbyggingum. Men tað er givið, at vatnorkan ikki nær námind kann nøkta tann ógvusliga vøksturin í streymframleiðslu, sum skal til, skal samfelagið av álvara "ravmagnast", fyri at sleppa av við oljuna.

Sjóvarfallsorkan, sum hugsað hevur verið um í fleiri áratíggju, tykist vera skilabesta og høgligasta orkukeldan at troyta afturat vatni og vindi. Sum Knud Simonsen, granskari, í fleiri almennum fyrilestrum hevur víst á, so síggja møguleikarnir út til at vera góðir fyri at fáa meira orku fyri munandi minni pengar við at troyta sjóvarfallsorkuna, samanborið við eitt nú at útbyggja vatnorkuna. Okkum tørvar bæði og.

Biogass er avgjørt ein møguleiki, sum eisini fleiri gløggir heilar hava arbeitt við – og her trýtur ikki tilfar til biogassframleiðslu við slógvi frá fiska- og alivivinnuni, neytamykju, tara og annað lívrunnið burturkast. Vetni er eisini møgulig og tøk tøkni.

Nógv størsti parturin av øllum heimsins farmaflutningi fer sjóvegis, og altjóða shippingvinnan tekur í løtuni stór tøk at finna hættir at spara orku, reinsa útlát, og gera royndir at nýta onnur brennievni enn olju til motorarnar – til dømis roynir Mærsk nú at sigla við biodiesel. Fleiri av loysnunum, ið verða mentar, kunnu helst eisini nýtast umborð á fiskiskipum í framtíðini, og kann koma afturat ymiskum orkusparandi loysnum, sum vera mentar her heima.

Fyri nøkrum døgum síðani lótu norðmenn upp eitt saltorkuverk. Her er talan um orku frá gjøgnumseyringartrýsti (osmosu) sum stendst tá feskvatn og sjógvur blandast. Saltorkuverkið er fyrsta royndarorkuverk av sínum slag, og er eitt dømi um orkuloysnir, vit ikki ímynda okkum í dag, men sum kunnu gerast partur av orkuloysnini í morgin.

Til ber at skriva nógvar síður um ymiskar orkuloysnir – eisini tær sum kunnu knýtast beinleiðis til sethús, bygningar og býlingum – hitapumpur, jarðhiti, sólkyknur osfre.

**Øll á mánan**

"Vit kunnu seta ein mann á mánan, men tað er ein trupulleiki at flyta øll uppá mánan". Orðini eigur Lars G Josefsson, stjóri á Vattenfall. Varandi orkukeldurnar eru har. Tøknisku loysnirnar eru har. Her heima er stóra avbjóðingin hópframleiðsla av orku frá óstøðugum orkukeldum, tí vit ikki hava møguleika at javna streymin á netinum við at útflyta yvirskotsorkuna (Íslandskaðal, sum gekk víðari niður á evropiska meginlandið kundi loyst tann trupulleikan, men tað liggur ikki beint fyri). Sjálvt við "klókari" talgildari tøkni, sum fer at geva betri útjavnan millum framleiðslu og streymnýtslu, verður hetta framvegis ein stór avbjóðing. At loysa tann spurningin má hava fremstu raðfesting.

**Verk má fylgja vilja**

Við felagsuppskotinum til samtyktar um at minka útlátið av $CO_2$, sum allir flokkar á tingi nú hava samtykt, er ein góður vilji staðfestur. Næsta stigið er at gera ítøkilig átøk at menna førleikan at royna alternativar orkuveitingar- og orkuspariskipanir og taka til okkum tøkniligar loysnir. Samstundis mugu vit savna kreftirnar og vitanina um varandi orku.

Sum nevnt í grein herfyri, eiga aðalráðnini at verða umskipaði, soleiðis at orkupolitikkur og veðurlagspolitikkur verða savnaði í einum sterkum ráði. Í hesum sambandi er tað eitt gott hugskot at umskipa SEV til dynamiskan stovn undir orkumálaráðnum, soleiðis at hesin kann ganga á odda í orkukollveltingini.

# Atlantic Airways og viðgerðin av flogvallarmálinum

MAGNI ARGE
stjóri



Í sambandi við fyrispurning hjá John Johannesen skal felagið boða frá, at skrivið til flogfólk felagsins var ein áheitan um at bera fram faklig sjónarmið um operativ viðurskifti og flogvallarútbyggingina til felagsins operativu leiðslu.

Felagið virðir fakliga førleikan hjá flogmonnum og fer at brúka hesi sjónarmið sum part av grundarlagnum í skipaðum samskifti við Vága Floghavn um útbyggingina, har flogovastin er limur í einum samstarvsbólki.

Felagið staðfesti eisini mannagogndir í sambandi við uttanhýsis samskiftið um týdningarmikil áhugamál og operationell viðurskifti hjá felagnum, sum leiðslan, herundir eisini flogovastin, varðar av vegna felagið.

Hetta varð gjørt, so ongin ivi skuldi valda um, hvørja støðu felagið hevur til flogvallarspurningin.

Frælsi at úttala seg um persónligar áskoðanir virðir felagið sjálvsagt.

Hevur løgtingsins vinnunevnd ynskir um at koma á tal við flogleiðlsuna og flogfólk hjá felagnum, fer felagið at medvirka til hetta við vælvild.

Í tíðindaskrivi 6. november 2009 segði felagið soleiðis frá síni støðu til menning av undirstøðukervinum til flogferðslu í Føroyum:

"Atlantic Airways metir tað sera týdningarmikið, at undirstøðukervið til flogferðslu í Føroyum verður ment. Lítlar og ongar íløgur eru gjørdar innan hetta øki í áratíggju, og felagið tók tí væl ímóti, tá gjørt varð av at byggja út flogvøllin í Vágum.

Tað hevur týdning at fremja íløgur, sum bæði kunnu bøta um regularitetin og skapa møguleikar at brúka onnur og størri flogfør enn í dag.

Atlantic Airways setir sítt álit á, at byggiharrin tryggjar, at Føroyar fáa best møguligu loysn í Vágum fyri peningin, sum er settur av til flogvallarútbyggingina.

Kjakið um ein nýggjan flogvøll aðrastaðni í landinum metir felagið áhugavert, men tað eigur ikki at darva nakrari útbygging í Vágum nú.

Felagið metir tað eisini átroðkandi, at myndugleikarnir sum skjótast endurmeta rasktrarleistin, sum flogvøllurin í Føroyum verður rikin eftir í dag, og tey gjøld, sum landskassin áleggur flogferðsluni og teimum ferðandi.

Gjøldini sum brúkarin rindar fyri at ferðast um flogvøllin í Føroyum er millum tey dýrastu í Evropa, og samlaðu nýtslugjøldini vaksa við meiri enn 50% eftir tveimum árum. Tann rokningin endar í síðsta enda hjá føroyska brúkaranum og skaðar menningina av føroyskari ferðavinnuni og føroyskari flogvinnu. Hetta hava mong onnur ferðamál í Europa skilt, og tí hava tey aðrastaðni lækkað ferðagjøldini til tess at økja samlaðu inntøkurnar hjá øllum pørtum við einum vaksandi streymi av ferðafólki."

# Fáa øll landsstýris- og tingfólk somu viðferð á Løgtingi?

BJØRN KALSØ
løgtingsmaður



Í kjalarvørrinum av nógvu umrøðu miðlanna av tilburði, tá løgtingsformaðurin mikudagin, sleit tingfund, tí løgmaður møtti ov seint at svara munnligum fyrispurningi frá Torbirni Jacobsen, hugsi eg, at niðanfyristandandi hevur týdning.

**Landsstýris- og tingfólk eiga at møta**

Tá munnligir fyrispurningar verða settir á Løgtingi, eiga spyrjari og tann, ið svara skal at møta. Einki annað kann góðtakast. Løgtingsins tign skal virðast. Spurnartekin kann tí neyvan setast við tilburðin, tá løgtingsformaðurin sleit tingfundin mikudagin í samband við, at uppmøtingin ikki var í lagi.

Løgmaður, sum annars altíð er neyvur í uppmøting, gjørdi tí eisini rætt, tá hann harmaðist tilburðin og bað um umbering.

**Tingformaðurin niðurlegði ikki tingfund, hóast Torbjørn ikki møtti**

Næstseinast munnligir fyrispurningar vóru fyri á Løgtingi, mikudagin tann 18.11.2009, kom stígur í tingarbeiðið góða løtu. Torbjørn Jacobsen, partamaður Hergeir Nielsens, var ikki møttur, tá fyrispurningur hansara um heilsutrygd, til landsstýrismannin í heilsumálum, skuldi svarast.

Tingfundurin varð ikki niðurlagdur í skundi, eins og tá løgmaður ikki var møttur. Tingformaðurin gav sær hesaferð góðar stundir, soleiðis at onkur floksfelagi Torbirnar og Hergeirs fekk kannað, um spyrjarin fór at møta.

Úrslitið var, at annars altíð atfinningarsami tingmaðurin ikki møtti. Men tá góð løta var umliðin setti annar tinglimur í Tjóðveldi spurningin til landsstýrismannin í heilsumálum og orðaskiftið helt fram, sum um einki var á vási, tiansheldur fall nøkur ábreiðsla.

**Øll eiga somu viðferð?**

Tað er skot fyri bógvin í arbeiðnum at varðveita Løgtingsins tign, um ikki øll landsstýris- og tingfólk, óansæð politiskan lit, fáa somu viðferð og kor at virka undir frá løgtingsformanninum. Hann hevur valdið og skal tí vera ímynd tignarinnar í Løgtinginum.

Vónandi fekk løgmaður somu tíðarfreist og sømdir annars á orrustutingfundinum 2. desember, soleiðis sum tjóveldistingmaðurin fekk 18. november!

Skal virðingin fyri Løgtingi og tingarbeiði varðveitast, er sera umráðandi, at landsstýris- og tingfólk, sum skulu á røðarapallin, møta og annars halda góðan tingsið. Somuleiðis hevur tað alstóran týdning, at løgtingsformaðurin gongur undan í allari tignarligheit. Hann má á ongan hátt nýta formanssessin í partapolitiskum spæli. Tvørturímóti eigur hann at leggja doyin á í royndini at geva øllum, ið starvast á Løgtingi, óansæð politiskan lit, somu sømdir.

Við vón um at so er!